| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 06. november 2008 |
| Býráðsfundur nr. | 10/2008 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2008 tann 06. november kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 30. oktober 2008 um innkalling til fundar. Talan er um fundin, sum fluttur varð frá 30. oktober 2008, hetta sambært kunngerð og skriv til býráðslimirnar, dagfest 23. oktober 2008.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Signar á Brúnni
Eyðun á Lakjuni
Petur Abrahamsen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Tórfríður Abrahamsen hevur boðað frá, at hann er uttanlanda í feriu frá 23. oktober til 10. november 2008 og kann tessvegna ikki luttaka á fundum í hesum tíðarskeiði.

Jón Nolsøe Olsen hevur við telduposti boðað borgarstjóranum frá, at hann ikki møtir á fundinum av persónligum orsøkum.

**Mál nr. 53/2008.**

**Viðvíkjandi uppskoti til "Reglugerð fyri uppsetan av vindmyllum til húsbrúks".**

Stýrið fyri Kommunusamskipan Føroya hevur á fundi tann 10. oktober 2008 samtykt "Reglugerð fyri uppsetan av vindmyllum til húsbrúks", og verður tað sostatt upp til hvørja limakommunu sær til at taka støðu til reglugerðina, møguliga við broytingum.

Málið hevuir verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 23. oktober 2008, og mælir nevndin býráðnum til, at fyriliggjandi uppskot til reglugerð verður galdandi fyri Fuglafjarðar kommunu.

**Avgerð:**
Tilmælið frá teknisku nevndini varð samtykt. (7-0). Sostatt verður reglugerðin sett í gildi frá 06. november 2008 at rokna.

**Mál nr. 54/2008.**

**Umsókn frá Bláa Krossi um fíggjarligan stuðul til byggjan av heimi.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Bláa Krossi, dagfest´05. mei 2008 um fíggjarligan stuðul áljóðandi kr. 140.000,00 til byggjan av nýggjum blákrossheimi úti á Nesi, har kommunan hevur latið ókeypis grundøki.

Saman við umsóknini verður víst til hagtøl fyri vitjanir á stovninum seinastu 6 árini.

Av tí at verandi umstøður ikki hava verið nøktandi, hevur felagsskapurin kanna møguleikar fyri at keypa nýggjar bygningar fyri at hýsa viðgerðartilboðunum, men er Blái krossur komin til ta niðurstøðu, at besta loysnin er at byggja bygning, og hesin verður bygdum á oman fyri nevnda staði.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt umsóknina á fundi tann 10. juni 2008 og aftur tann 11. september 2008, og heldur nevndin talan verða um sera viðkomandi og gott endamál, og er annars sinnað at játta peningin.

Hesin er tó ikki tøkur á stuðulskontoini inniverandi fíggjarár, og mælir nevndin býráðnum til at játtan peningin ybir 2 fíggjarár við kr. 70.000,00 um árið, t.v.s. í 2009 og 2010.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 28. oktober 2008 o mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini um at veita kr. 70.000,00 í fíggjarligum stuðli yvir 2 fíggjarár frá

2009 at rokna. Sostatt verður peningurin at avseta á serligari játtan bæði fyri fíggjarárið 2009 og 2010.

Tá ið talan er um eina játtan, sum í hesum føri er yvir meira enn 1 fíggjarár, so verður neyðugt at søkja Fíggjarmálaráðið um góðkenning til at veita eina tílíka, tá ið býráðið ongar heimildir annars hevur fyri at veita játtanir fyri meira enn 1 ár í senn (varandi játtanir), hetta sambært kommunustýrislógini.

**Avgerð:**
Broytingaruppskot frá Signari á Brúnni um at útseta viðgerðina av málinum til nýtt býráð tekur við eftir 01. januar 2009 fall. (1 atk. fyri, 5 atkv. ímóti og 1 atkv. var blonk. Ímóti atkvøddu Eyðun á Lakjuni, Jann Toftegaard, Elisaberh D. Eldevig og Sigurð S. Simonsen. Blankt atkvøddi Petur Abrahamsen.

Tilmælini frá mentamálanevndini og fíggjarnevndini vórðu samtykt. (6-1). Ímóti atkvøddi Signar á Brúnni.

**Mál nr. 55/2008**.

**Umsókn frá ÍF kappróðri um pylsusøluloyvi.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá ÍF kappróðri, dagfest 25. september 2008 um pylsusøluloyvi í Fuglafjarðar kommunu, hetta við at tryggja felagnum aðrar inntøkur enn stuðul og atgongumerkjasølu.

Felagið hevur fingið til vega ein lítlan pylsuvogn, haðani ætlanin er at selja pylsur og tílíkt í kommununi. Skráseting og loyvi annars eru fingin til vega, og verður í umsóknini vónað, at kommunan er sinnað at loyva felagnum at fara undir tílíkt virksemi.

Í hesum sambandi verður víst til notat frá býráðsskrivaranum, dagfest 20. apríl 2004, har víst verður til telefonsamrøðu við Politigarðin í Tórshavn um generell "Pylsusøluloyvi" í kommunum í Føroyum, sí annars skriv kommununar til teirra, dagfest 11. og 30. mars 2004.

Upplýast verður frá teimum, at tað bert er býráðið, sum gevur tílík loyvi og ikki politiið. Greitt verður frá, at tað somuleiðis er býráðið sum ger av, hvørjar upplatingartíðir ein pylsuvognur ella pylsubarr kann fáa eitt nú í vikuskiftunum, eftir kl. 23.00 á kvøldi.

Tó skal eitt evt. loyvi verða treytað av góðkenning frá Heilsufrøðisligu starvsstovuni, og skal løgreglan (Eysturoyar sýsla í okkara føri) altíð hava avrit einum pylsusøluloyvi, sum býráðið veitir í tílíkum førum, so teir eru kunnaðir um viðkomandi virksemi.

Annars gevur løgreglan bert loyvir av tílíkum slagi, sum galdandi verða t.d. eitt kvøld ella eitt vikuskifti.

Upplýsast skal, at sum støðan er ídag er einki generellt pylsusøluloyvi veitt í kommununi, men bert nøkur loyvi eftir umsókn, sum eru av slíkum slagi, sum nevnd eru niðast í notatinum, t.v.s. í vikuskiftum ella í sambandi við stevnur.

**Avgerð:**
Samtykt varð at geva ÍF kappróðri pylsusøluloyvi í 1 ár frá 06. november 2008 at rokna allar vikudagar millum kl. 18.00 og 23.00. Tó verður loyvi veitt felagnum at hava opið í vikuskiftum, t.v.s. leygar- og sunnunætur til kl. 05.00.

Treytin fyri loyvinum er, at økini, har pylsuvognurin kemur at standa verða hildin rein og ruddilig, og at alt órudd, sum møguliga liggur á økinum verður tikið upp, seinast beint eftir at sølan er afturlatin. Eisini skal kommunan hava frágreiðing um, á hvørjum økjum í kommununi ætlanin er at seta pylsuvognin. (7-0).

**Mál nr. 57/2008.**

**Viðvíkjandi ískoyti til leigusáttmálar millum kommununa og P/F Havsbrún á havnarøkinum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 26. september 2008 fingið áheitan frá P/F Havsbrún um at undirskriva ískoyti til leigusáttmálar millum kommununa og felagið á havnarøkinum, soleiðis, at útleigari góðtekur, at yvirtøkuheimildirnar í leigusáttmálunum, sum er latin FIH Erhvervsbank A/S við ískoytum 12. mars 2002, verða broyttir soleiðis, at rætturin til at yvirtaka leigumál partvíst verður latin til FIH Kapitalbank A/S.

*Talan er um hesar leigusáttmálar:*

1. Ketilhús á matr. nr. 239z, dagfestur 23. februar 1999
2. Goymslubygningur FD á matr. nr. 239ac, dagfestur 08. mei 2006
3. Pelagos á matr. nr. 239f, dagfestur 18. juni 2002
4. Mjølgoymsla á matr. nr. 239d, dagfestur 06. februar 1999
5. Blandi- og silohøll FD á matr. nr. 239t, dagfestur 08. mei 2001
6. Ennitangar á matr. nr. 239s, dagfestur 30. september 1986
7. Fóðurvirkið á matr. nr. 239r, dagfestur 10. mars 1987
8. Mjølvirkið á matr. nr. 240, dagfestur 07. mars 1966.

Bankin kemur sostatt framyvir at verða fyrsti til at yvirtaka leigumálini, og eisini tær treytir, sum settar eru í ískoytini, dagfest 12. mars 2002, sum býráðið samtykti og undirskrivaði á fundi 19. mars 2002.

Útleigari góðtekur somuleiðis, at FIH Erhvervsbank A/S sum sekunderur panthavari eisini kann yvirtaka møguligar leigusáttmálar til somu treytir, sum settar eru í ískoytum, dagfest 12. mars 2002 við góðkenning frá FIH Kapitalbank A/S.

Fundur hevur verið millum býráðsleiðsluna og Niels W. Poulsen og Eyðbjørn Larsen, advokatar á Advokatskrivstovuni tann 31. oktober 2008 um nakað er til hindurs fyri at góðkennna og undirskriva ískoytini kommununar vegna. Metan teirra er, at einki løgfrøðisligt fyrivarni skal verða tikið í sambandi við avgreiðslu av málinum.

**Avgerð:**
Samtykt at góðkenna ískoytið til leigusáttmálarnar millum kommununa og P/F Havsbrún, soleiðis at rætturin til at yvirtaka møgulig leigumál partvíst verður latin FIF Kapitalbank A/S, og at hesin fær fyrsta veðrætt, meðan FIH Erhvervsbank A/S framyvir kemur at hava annan veðrætt eftir FIH Kapiltalbank. (7-0).

Ískoytini fyri allar leigusáttmálarnar vórðu undirskrivað á fundinum.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.35.

Jann Toftegaard

Dánjal vang

Elisabeth D. Eldevig

Signar á Brúnni

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen